# TVINGSILSSØLA YVIR SKIP

Eftir áheitan frá Jógvan Ellefsen, Advokatfelagið við Strond 4, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 31 12 60, vegna Norðoya Sparikassa, verður

**týsdagin tann 26. juni 2007 kl. 9:15**

á Dómaraskrivstovuni í Tórshavn, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla (AS 10/2007 – j.nr. 4837301) yvir skipið **Jøkul**, kenningsbókstavir OW 2258.

Sambært skipsblaðnum er skipið bygt í Klaksvík í 1978 úr eik, og er skrásett heimahoyrandi í Klaksvík. Skipið til støddar 51,27 bruttotons og 15,59 nettotons. Motorurin er ein 8 cyl. 4-takt diesel typa BA 8M816. 315 Kw og er frá 1997.

Jøkul hevur fiskirættindi til fiskiskap eftir botnfiski á føroysku landleiðunum sum fiskifar í bólki 4B. Fyri fiskiárið 2006/2007 hevur Fiskivinnustovan skrivað eigaranum fiskiloyvi til 86,6 dagar. Harumframt hevur Jøkul árini frammanundan havt fiskiloyvi til kalvaveiðu í íslendskum sjógvi. Seinasta ár var 2001.

Eigari av skipinum er Sp/f Borgarin, Víkavegur 105, 700 Klaksvík.

Fyrireikandi tvingsilssølufundur verður hildin á Dómaraskrivstovuni

**týsdagin 12. juni 2007 kl. 11:15.**

Einhvør, ið metir seg hava rættindi í skipinum, verður hervið innkallaður til at møta á nevndu fundum.

Avrit av uppskoti til tvingsilssølutreytir fáast við at venda sær til Jógvan Ellefsen, advokat.

Skjølini viðvíkjandi tvingsilssøluni liggja frammi á Dómaraskrivstovuni.

Føroya Fútarættur, tann 2. mai 2007.

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
**HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO**

TÓRMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR



# Hús í Leirvík til sølu

**Tlf. 737306 ella sí www.sel.fo**

# SØVNINI Í SUMMAR

Í summar verður opið soleiðis:

**Føroya Fornminnissavn**
**Avgreiðslan: tlf. 310700**
Kúrdalsvegi 2, Hoyvík
mánadag – fríggjadag kl. 9 - 12 & kl.13 - 15

**Framsýningin í Brekkutúni 6 tlf. 318076**
**Útisavnið í Hoyvík, Heima á Garði**
Í tíðarskeiðnum 15. mai – 15. september:
mánadag – fríggjadag kl. 10 - 17
leygardag og sunnudag kl. 14 - 17

**Føroya Náttúrugripasavn tlf. 352300**
**Framsýningarnar á Debesartrøð:**
Í tíðarskeiðnum 15. mai – 15. september:
mánadag – fríggjadag kl. 10 - 16
leygar- og sunnudag kl. 15 - 17

**Føroya Landsskjalasavn tlf. 316677**
**Í tíðarskeiðnum 23. juli – 3. august stongt**
Í tíðarskeiðnum 1. juni – 20. juli og
6. august – 31. august
er lesistovan opin: mánadag, týsdag,
hósdag og fríggjadag kl. 10 - 16
mikudag er stongt

**Føroya landsbókasavn tlf. 311626**
Í tíðarskeiðnum 25. juni – 17. august:
mánadag – fríggjadag kl. 10 - 15

**Býarbókasavnið tlf. 302030**
hevur opið sum vant:
mánadag – fríggjadag kl. 10 - 18
leygardag kl. 10 - 13

**Listasavn Føroya tlf. 313579**
Upplatingartíðir – Open hours
1. mai - 31. august
Týsdag / Tuesday – Fríggjadag / Friday
kl. 11 - 16
Leygardag / Saturday – Sunnudag / Sunday
kl. 14 - 17
Mánadag / Monday
stongt /closed

***Tórshavn, 16. mai 2007***

***Søvnini***

# Aðalfundur

**P/f Tjaldur hevur ársaðalfund týsdagin 29. mai 2007, klokkan 16, í fundarhølunum hjá grannskoðarafelagnum Rasmussen & Weihe, Hoyvíksvegi 5, Tórshavn.**

**Dagsskrá smb. viðtøkum felagsins:**

a. Frásøgn nevndarinnar um virkið í lidna ári
b. Framløga av hinum grannskoðaða roknskapi og fíggjarstandi
c. Uppskot frá nevndini um, hvussu ársavlopið skal verða nýtt
d. Val av 3-7 nevndarlimum, sum verða valdir fyri 1 ár í senn
e. Val av grannskoðara, sum verður valdur fyri 1 ár í senn, til at grannskoða roknskapin fyri inniverandi árið.
f. Uppskot um viðtøkubroytingar, gr. 3 og 5.

Atgonguseðil fæst við at ringja til tlf. 45 75 00 í seinasta lagi 25. mai kl. 12.00.

***NEVNDIN***



# VITJA SKOPUN

**Koyrið / gangið ein túr og njótið okkara vøkru oyggj. Leggið til merkis góða ferðasambandið.**

Frá 20/5-1/9 2007 hava Kunningarstovan, Café Skopun og Grillin opið soleiðis:

**Mán-Frí**
11.00 – 14.00
18.00 – 22.00

**Leyg – sun**
15.00 – 22.00

Her fært tú alla vanliga touristinformatión. Í Café'ini kanst tú njóta ein góðan kaffi-/temunn við onkrum góðum afturvið.

Eisini fært tú alla vanliga grillvøru.

**Ringið vinarliga á tlf. 361704**
**fartlf. 268920**
**Fax 361804**

parfumarí Drós

Til Sølu

- Handilin er í støðugari framgongd
- Umboðar tey kendastu merkir
- Liggur væl fyri í miðbýnum
- Góðan kundaskara

Vil tú hava avbjóðingar er hetta ein góður møguleiki.

Meir fæst at vita við at venda sær til tlf 514811 ella á mail dros@dros.fo

CLINIQUE
ESTĒE LAUDER
aramis
ORIGINS

# Maskinstjóri

**til veitingarskip í frálandavinnu**

Søkt verður eftir maskinstjóra til veitingarskip í frálandavinnu í Norðsjónum at mynstra sum skjótast. Skipið er skrásett í Føroysku Altjóða Skipaskránni, FAS, og verður mannað við føroyingum burturav.

Maskinorkan er 8000 HK.

Upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringa 35 85 31 ella 21 85 33.

Umsóknir kunnu sendast til Sp/f Team Beredskab, Niels Finsensgøta 23, FO-100 Tórshavn ella á t-post: joan@tor-shipping.fo.

**Sp/f Team Beredskab**